Blokkniðurskurðurin feldi Helenu

- Ein orsøk til, at limirnir í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag revsaðu Helenu var møgliga tann stóri niðurskurðurin av blokkinum hon var við til at samtykkja. Hennara støða í hasum málinum hevur gjørt tað truplari fyri Javnaðarflokkin at kunna føra sín politikk út í lívið. Júst hetta hevur tí helst verið eitt rættiliga týðandi element í teimum metingum, sum limirnir í SSJ hava gjørt sær heldur formaður Javnaðarfloksins, sum tekur avgerðina hjá felagnum til eftirtektar, tó at hann heldur, at Helena hevði verið við til at styrkt flokkin.

UPPSTILING TIL LØGTINGVAL
Jan Müller

- Hetta er sjálvandi ein avgerð hjá tí lokala felagnum, og hana mugu vit taka til eftirtektar, men tað kemst ikki uttan um, at tað harmar meg eitt sindur, at man hevur trupulleikar við at leggja eitt gamalt stríð aftur um seg og lata upp fyri nøkrum nýggjum møguleikum sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, nú uppstillingin í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag mikukvøldið endaði við, at Helena Dam á Neystabø ikki kom á listan til løgtingsvalið.

Mugu ikki dyrka ósemjur

Jóannes Eidesgaard heldur tað vera rætt at vísa á tað, sum nú hendir á Tvøroyri. – Tað, sum hendi í Havn mikukvøldið, er ikki serliga analogt við tað, sum hendi á Tvøroyri seinasta sunnudag, har vit stovnaðu eitt nýtt felag, ið avloysir trý feløg. Tað er eingin loyna, at fleiri av teimum feløgunum hava ligið í einum innanhýsis stríði í fleiri ár. Tað hava vit so lagt aftur um okkum. Eg dugi tí ikki at síggja nakað endamál í tí politiska lívinum at dyrka ósemjur, líka mikið hvar man er í landinum. Tað má vera málið at leggja ósemjur aftur um seg og arbeiða frameftir.

Hann vísir á, at tað er ikki nakað eindømi, at politikarar skifta flokk. Tað er nakað, sum hendir í nógvum londum, og tað eigur man at hava loyvi til.

Serliga ein Javnaðarflokkur, sum byggir á breðralag og forstáilsi, eigur at lata upp fyri, at man eisini kann saðla um politiskt, um tú kemur til ta niðurstøðu, at tað, sum tú hevur staðið fyri frammanundan, er ikki gott nokk. - Heldur átti man at frøðst um, at onkur aftrat nú tekur undir við okkara sjónarmiðjum á sjálvstýrisvonginum og viðvíkjandi vælferðarsamfelagnum. Men tað hevur man so ikki gjørt, og tað verða vit noydd at taka til eftirtektar.

Mong góð dømi

-Men tá so stór mótstøða var at fáa hana á listan, liggur hetta so ikki meira djúpt enn bara tað at dyrka ósemjur, og kann tað ikki hugsast, at mong javnaðarfólk hava havt ringt við frá degi til dags at skula stuðla einum politikara, sum hevur verið í andstøðu til flokkin so leingi og sum entá hevur verið formaður í øðrum flokki?

- Tað er møguligt. Men vit hava dømi um fólk, sum eru komin uppí Javnaðarflokkin eftir at hava verið í øðrum flokkum, og har eingin trupulleiki bleiv av tí. Verkamannafylkingin gav okkum ótrúliga harða mótstøðu í valstríðnum í 94 og var medvirkandi til, at vit fingu ein lemjandi ósigur á tí valinum. Men fólkini í Verkamannafylkingini hava síðani roynst ómetaliga væl fyri Javnaðarflokkin, tá tey seinni komu upp í flokkin. Tað vóru eisini markantir politikarar, men tað kláraði man at liva við. So eg haldi, at vit hava positivar royndir av slíkum sigur Jóannes Eidesgaard, sum tó ikki dylur fyri, tá talan er um ein framstandandi politikara í einum øðrum flokki, so er tað rætt, at tað kann tað skapa ein ótryggleika millum vanligar limir. Og tann ótryggi fer oftani í eina verjustøðu og atkvøður nei.

Stundirnar ikki góðar

- Kann tað vera, at øll henda tilgongdin hevur verið ov stutt, at javnaðarfólk hava kanska ikki havt neyðugu tíðina til at lata tingini sodna, og at Helena Dam á Neystabø kanska heldur ikki sjálv hevur havt neyðugu tíðina og rætta pallin til at kunna greiða frá sini broyttu støðu?

- Stríðið í Sjálvstýrisflokkinum er ikki so gamalt. Tað hevði møguliga verið ein heilt onnur støða, um vit vóru mitt í einum valskeiði, har man kundi havt stundir til at vant seg við tankan. Men tær stundirnar góvust ikki. At tingini verða so forserað ger helst, at fólk kenna seg ótrygg og verða yvirhálað av nøkrum, og har tey ikki rættiliga hava gjørt upp við seg sjálvan, hvussu tey skulu fyrihalda seg.

- Heldur tú útmeldingarnar hjá Helenu hava verið nóg heilhjartaðar og greiðar, soleiðis at hon við teimum veruliga hevur megnað at venda síni fortið bakið, soleiðis at javnaðarfólk hava kunnað tikið hana fyri fult?

Hon flytur seg

- Tá ein persónur sum Helena Dam á Neystabø hevur hug at koma upp í Javnaðarflokkin, so er tað ikki tí, at Javnaðarflokkurin flytur seg mótvegis henni. Tað er hon, sum flytur seg. Og tað er greitt, tí hevur hennara trúvirði ein trupulleika, og tað er so hon, sum skal út at verja sítt politiska trúvirði.

Formaður Javnaðarfloksins vísir á, at Helena Dam á Neystabø hevur sagt seg taka fult og heilt undir við Sjálvstýrislógini, sum leggur upp til eina munandi meira hóvliga gongd. Hon hevur viðgingið, at tað finst eingin loysn í sjálvstýrispolitikkinum uttan um Javnaðarflokkin. Tá tað snýr seg um vælferðarøkið, hevur tað hon stendur fyri á t.d. pensiónsøkinum ikki ligið so langt frá tí Javnaðarflokkurin stendur fyri.

Hvat teimum stóru málunum viðvíkur, so sigur Jóannes Eidesgaard seg hava upplivað í teimum samrøðum hann hevur havt við Helenu, at tað eru sjónarmið, sum saktans kunnu harmoniserast. Men tað er greitt, at ótryggleikin er kanska millum limirnar út frá tí, at hon hevur staðið markant á fullveldiskósini millum Høgna og Anfinn.

- Út frá tí sannroyndini kemur tað kanska ikki so óvart á teg, at hon ikki kom á listan?

- Nei. Men hinvegin kundi ein eisini sæð tað soleiðis, at við henni fingu vit so ein meira í okkara kór, sum mælir til nakað meira hóvligt enn tað, sum Høgni og Anfinn hava mælt til. Tað eigur eisini at bera til at síggja tað frá hini síðuni, at tað er hugaligt, at sjónarmiðini Javnaðarflokkin at føra sín politikk út í lívið. Sjálvur vil eg halda, at júst hetta hevur verið eitt rættiliga týðandi element í teimum metingum, sum limirnir í SSJ hava gjørt sær.

Um Helena í størri mun hevði rannsakað seg og í størri mun lagt sjógv til politikkin í farandi skeiði eitt nú til stóra blokkniðurskurðin heldur Jóannes Eidesgaard so, at tað hevði broytt nakað?

- Tá man roynir at finna út av, hví hon fór úr Sjálvstýrisflokkinum, um tað var tí hon ikki kundi standa inni fyri politikkinum, sum Sjálvstýrisflokkurin stóð fyri í samgonguni ella tað varð orsakað av innahýsis stríði millum hana og Sámal Petur í Grund – tá hevði hon sjálvandi staðið munandi sterkari í eygunum á javnaðarfólki, um tað varð so, at hon gjørdi bart og segði, at hon kundi ikki stuðla samgonguni orsakað av hennara politisku støðu. Hevði tað hent munandi fyrr, so hevði støðan helst eisini verið heilt ein onnur.

- Tað hevur víst seg at vera turbulensur, har Helena hevur verið og vil onkur spyrja, um man ikki hevði fingið líknandi stríð og ósemjur kom hon upp í Javnaðarflokkin. Hevur tú varhugan av tí?

- Eg vóni ikki, at nakar ynskir, at Javnaðarflokkurin skal vera ein losja av hugnaligum politikarum, sum renna undan hvørjum stríði. Politikkur er at hava eitt opið vindeygað útetir. Torir man ikki at onnur nærkast flokkinum, so hevur man eitt veldugt problem. Tí má flokkurin ikki gerast eitt stað, har man bara situr og verjir síni egnu sjónarmið og annars ikki vil órógvast av øðrum. Tað er sera vandamikið. Tú mást alla tíðina bjóða teg fram og vera opin fyri, at nýggj fólk leggjast til og serliga ung. Tað er lætt, at øll eru ikki nemm. Summi eru meira kontroversiell enn onnur.

Jóannes Eidesgaard: -Tað kemur eitt val aftaná hetta, og Helena hevur framvegis eitt langt politiskt lív frammanfyri sær sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, ið eisini vísir á, at hann í øllum hesum málinum við Helenu hevur sæð tað sum sína skyldu sum formaður ikki at lata ein møguleika fara afturvið borðinum uttan víðari. At felagið í Havn ikki hevur tikið undir við tí er so teirra avgerð

Metti tað vera rætt

- Tú heldur ikki tað hevði skatt Javnaðarflokkin, at Helena kom uppí flokkin og eisini á ting?

- Tað er ringt at meta um. Men tað var so ikki tað sum eg metti frá byrjan. Eg helt, at kundi hon foreina sína politisku sjónarmið við okkara og vildi fara út at stríðast fyri teimum saman við okkum, so dugdi eg ikki at síggja ein trupulleika av, at hon konverteraði til Javnaðarflokkin. Tað bleiv so hennara avbjóðing at fara út og verja sín politiska leiklut eftir ta avgerðina.

- Onkur hevur sagt, at har Helena er, har er hon heil og har vil hon eisini ráða. Tú hevur ikki hugsað um, at hon kundi verið ein hóttan móti tær sjálvum sum formaður í framtíðini, kom hon sterkt inn?

- Sum formaður í Javnaðarflokkinum er tað mín uppgáva at tæna flokkinum sum best. Skulu tey persónliga áhugamálini telja meira, tá eru vit á eini vandamiklari kós. So mín støða er ikki tann mest áhugaverða í hesum samanhanginum.

- Tað hevur ligið í luftini, at tú hevur mett, at hon fór at styrkja flokkin kom hon á listan. Er tað so eitt afturstig fyri teg og tín formansskap, at hon kortini ikki kom á listan?

- Tað er eingin loyna, at eg var rættiliga opin mótvegis Helenu, tá tað varð staðfest, at hon varð áhugað fyri at koma upp í Javnaðarflokkin. Tað var væl tí, at eg metti, at tað vildi styrkja okkara støðu í Suðurstreymi, har kappingin verður munandi harðari enn í nøkrum øðrum valdømi, tí tað er har flestu veljararnir eru og har okkara kappingarneytar hava ótrúliga sterkar listar. Eg skal ærliga viðganga, at eg metti tað hevði styrkt okkara lista var hon við. Tá tað ikki hendi, má eg so taka ta støðu til eftirtektar.

- Kann hetta "stríðið um Helenu" hava skatt stevið í tingbólkinum og valstríðið annars?

- Tað vil eg ikki vóna. Tingbólkurin hevur í nógvum málum verið ósamdur og havt nógvar tingingar, áðrenn vit eru nádd fram til semju. Hetta klára vit eisini.

Eitt val aftaná hetta

Uppá fyrispurning um hann hevur nakað gott ráð til Helenu nú sigur Jóannes Eidesgaard, at tað kemur væl eitt val aftaná hetta, og Helena hevur framvegis eitt langt politiskt lív framman fyri sær. Tað verður so hennara avgerð, hvussu hon tacklar stoðuna.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hann í øllum hesum málinum við Helenu hevur sæð tað sum sína skyldu sum formaður ikki at lata ein møguleika fara afturvið borðinum uttan víðari. At felagið í Havn ikki hevur tikið undir við tí er so teirra avgerð.

- Mítt grundsjónarmið er, at man sum leiðandi politikari í einum flokki ikki hevur loyvi til at halda fast um gamlar ósemjur. Man hevur undir ongum umstøðum loyvi til at røkja persónsáhugamál framum fluksáhugamál. Og tað meini eg avgjørt ikki eg havi gjørt í hesum málinum. Tí haldi eg, at eg sum formaður havi gjørt tað, sum varð rætt.

– Eg kundi gjørt Javnaðarflokkin breiðari

Eg kann bara staðfesta, at limirnir í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag ikki vilja hava meg á listan, og at veljarin sostatt ikki sleppur at tala, sigur Helena Dam á Neystabø, sum mikukvøldið varð vrakað sum valevni hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymi

UPPSTILLING
Eirikur Lindenskov

– Demokratiið hevur talað, men veljarin slapp ikki at tala.

Hetta var fyrsta viðmerkingin frá Helenu Dam á Neystabø, efitir at hon varð vrakað sum valevni hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymoy mikukvøldið.

– Eg hevði eitt tilboð til Javnaðarflokkin, og tað var at lata meg stilla upp fyri flokkin, eftir at fleiri fólk í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag – og leiðandi fólk í flokkinum – heittu á meg um at stilla upp, sigur Helena Dam á Neystabø.

– Men tað eydnaðist ikki, og eg kann bara staðfesta, at Suðurstreymoyar Javnaðarfelag ikki er av somu áskoðan, sum teir limir, ið hava heitt á meg, sigur Helena Dam á Neystabø.

– Míni hjartamál eru sjálvstýrismálið og vælferðarmálið. Eg haldi, at hesi mál best kunnu samansjóðast í Javnaðarflokkinum, men tað eydnaðist bara ikki hesaferð. Kanska høvi býðst seinni…
Mynd: Eirikur Lindenskov

Hevur einastu loysnina

Sum støðan nú er, eru dagarnir hjá Helenu Dam á Neystabø sum tingkvinna taldir. Hon sigur, at hóast hon varð vrakað sum valevni hjá Javnaðarflokkinum, so ætlar hon ikki at meldað seg úr flokkinum.

– Míni hjartamál eru sjálvstýrismálið og vælferðarmálið. Eg haldi, at hesi mál best kunnu samansjóðast í Javnaðarflokkinum, men tað eydnaðist bara ikki hesaferð. Kanska høvi býðst seinni, sigur Helena Dam á Neystabø.

Hon heldur, at tað er av sera stórum týdningi, at vit fáa loyst sjálvstýrismálið. Loysnin hjá sitandi samgongu er miseydnað. Einasti máti at loysa hendan trupulleika er gjøgnum sjálvstýrislinjuna hjá Javnaðarflokkinum, heldur hon.

– Eg merkti mær tó á fundinum, at limirnir í Suðurstreymoyar Javnaðarfela kanska heldur vildu verja sambandsleiðina – men eg haldi, at bestu møguleikar at virka fyri eini samansjóðing av sjálvstýrismálinum og vælferðarmálinum er gjøgnum Javnaðarflokkin.

Helena Dam á Neystabø leggur dent á, at vit mugu koma burtur úr støðuni, sum hevur eyðkent seinastu tvey valskeiðini. Í hesum valskeiðinum hevur fullveldismálið fylt alt ov nógv, meðan sjálvstýrismálið undir landsstýrinum hjá Edmund Joensen var eitt tabu-evni.

Neyvan stillari

Sosialurin spurdi eisini Helenu Dam á Neystabø, um hon fór at taka av at gerast stillari hjá Javnaðarflokkinum, um tað varð heitt á hana um tað. Hóast hon ikki beinleiðis avvísti tí, so helt hon tað verða ógvuliga lítið sannlíkt, at hon fór at fáa slíka áheitan, tá hon júst varð vrakað sum valevni. Men tað er einki dulsmál, at fleiri framstandandi javnaðarfólk fegin vilja hava Helenu Dam á Neystabø sum lim í Javnaðarflokkinum, men tey halda, at tað er ov tíðliga hjá henni at stilla upp til valið hesaferð. Onkur hevur heitt á hana um at taka ein steðg, og síðani at stilla upp næstu ferð, tí tað kann skaða trúðvirði hjá Javnaðarflokkinum, at hon sum framstandi fullveldispolitikari stillar upp fyri Javnaðarflokkin, uttan at hon fyrst kann vísa, at hon fult og heilt tekur undir við grundsjónarmiðum floksins.

– Hatta skilji eg ikki rættuliga. Um eg skaði trúvirði hjá flokkinum nú, so dugi eg ikki at síggja, at eg ikki eisini gera tað um fýra ár, heldur hon.

Listin ikki nóg breiður

Helena Dam á Neystabø var limur í Javnaðarflokkinum til triðja uppstillingarfund hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag í 1990. Tá meldaði hon seg úr flokkinum, eftir at maður hennara, Kristian á Neystabø, ikki slapp á listan. Hann stillaði upp til løgtingsvalið í 1988, tá hann gjørdist nummar fýra á listanum.

Fáar dagar eftir hendan fundin hevði Sjálvstýrisflokkurin í Suðurstreymoy síðsta uppstilingarfund, og tá kom Helena Dam á Neystabø á listan – og varð vald.

Spurd um hon heldur, at fólk í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag kanska bera agg til hana av hesi orsøk, sigur Helena Dam á Neystabø, at tað skilir hon ikki.

– Gera tey tað, so eru tey ikki víðskygt, tí hatta er eitt gamal mál sum langt síðani er farið. Um eg stillaði upp fyri Javnaðarflokkin nú, so hevði eg kunna givið flokkinum eina størri breidd. Tey fólkini, sum komu á listan, eru ov eins, sigur Helena Dam á Neystabø.

Linstin hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymi

Tummas Arabo, Signabøur
Bergur Dam, Tórshavn
Eyðálvur Dimon, Hoyvík
Katrin Gaard, Hoyvík
Katrin Dahl Jakobsen, Tórshavn
Elin Lindenskov, Tórshavn
Kristian Magnussen, Tórshavn
Jan Midjord, Argir
Kári Petersen, Tórshavn
Hendrik Thomsen, Tórshavn
Joan Ziskason, Hoyvík

Helena Dam á Neystabø vrakað av Javnaðarflokkinum

Helena Dam á Neystabø møtti massivari mótstøðu, tá hon á uppstillingarfundi hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag í mikukvøldið varð vrakað sum valevni hjá Javnaðarflokkinum

UPPSTILLING
Eirikur Lindenskov

Við 24 atkvøðum frá teimum umleið 100 møttu limunum í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag eydnaðist tað ikki Helenu Dam á Neystabø at gerast valevni hjá Javnaðarflokkinum til løgtingsvalið komandi. Í øllum førum sleppur hon ikki at stilla upp fyri Javnaðarflokkin í Suðurstreymoy.

Stórur spenningur hevur verið, hvørt tað fór at eydnast Helenu Dam á Neystabø at sleppa upp á listan, nú hon í síðstu viku meldaði seg sum lim í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag.

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag hevði annan og triða uppstillingarfund í hølum Starvsmannafelagsins mikukvøldið, og tá skuldu limirnir velja út 11 valevni av teimum 15, sum vóru í uppskoti. Helena Dam á Neystabø varð skotin upp á øðrum uppstillingarfundi, men tá atkvøtt varð, fall hon á 12 pláss á listanum. Hon var 20 atkvøður frá at vinna 11. pláss.

Síðani varð annar uppstillingarfundur niðurlagdur, og triði uppstillingarfundur settur løtu seinni. Á triðja uppstillingarfundi kundi bert atkvøðast – nýggj fólk kunnu tá ikki koma á listan, og tá skuldu møttu limirnir kjósa sær tey 11 fólkini, sum skulu verða valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi til løgtingsvalið, sum verður í seinasta lagi 30. apríl.

Eftir at úrslitið av øðrum uppstillingarfundi var greitt, varð sjálvandi stórur spenningur, hvussu atkvøðubýtið fór at verða eftir triðja uppstillingarfund, men har var kortini ikki tann stóra broytingin. Tey somu 11 fólkin vórðu vald á listan, men Helena Dam á Neystabø endaði hesaferð sum nummar 13, og vantaðu henni 28 atkvøður í at vinna seg fram um nummar 11 á listanum.

Saman við Helenu Dam á Neystabø høvdu fleiri fólk teknað seg sum limir í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag seinastu dagarnar. Men tey sluppu – eins og Helena sjálv – ikki at atkvøða, tí lógir Javnaðarfloksins siga, at atkvøðurætt á uppstillingarfundi, hava bara fólk, sum vóru limir fyri fyrsta uppstillingarfund, og hann hevur verið fyri fleiri mánaðum síðani.

Helena Dam á Neystabø hitti tiðindafólk eftir uppstillingarfundin mikukvøldið
Mynd: Eirikur Lindenskov

Helena fingið tilboð um at stilla upp í Norðstreymoy

– Tað er rætt, at eg havi fingið fyrispurning um at stilla upp fyri Javnaðarflokkin í Norðurstreymoy, sigur Helena Dam á Neystabø

UPPSTILLING
Eirikur Lindenskov

Hóast borgarar í Suðurstreymi ikki fáa høvi at atkvøða fyri Helenu Dam á Neystabø til komandi løgtingsval, so eru allar súður ikki syftar enn. Eftir uppstillingarfundin hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag váttaði Helena Dam á Neystabø leysatíðindini um, at hon hevur fingið fyrispurning um at stilla upp fyri Javnaðarflokkin í Norðurstreymoy.

– Eg búgvi í Havn, og eg eri limur í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag. Eg varð biðin um at vera í uppskoti til at stilla upp fyri Javnaðarflokkin í Suðurstreymoy, men limirnir í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag vildu tað øðrvísi. Men tað er rætt, at eg eri biðin um at stilla upp í Norðurstreymoy, men eg havi ikki fleiri viðmerkingar til tað. Hatta fari eg at tosa við nevndina í felagnum um, sigur Helena Dam á Neystabø.

Hon váttar tó, at hon ikki verður á nøkrum lista hjá nøkrum øðrum flokki enn Javnaðarflokkinum, hvørki í Suðurstreymoy ella aðrastaðni.

Norðstreymoyar Javnaðarfelag hevur uppstillingarfund sunnudagin.

Norðstreymoyar valdømi er tað valdømi, har Javnaðarflokkurin søguliga hevur verið veikastur. Fyrstu ferð Javnaðarflokkurin fekk mann valdan í Norðstreymoyar valdømi var í 1984, tá Tummas Arabo varð valdur. Hann fall aftur til valið í 1988, men varð afturvaldur til valið í 1990 og fall aftur í 1994.

Í 1998 varð Hans Pauli Strøm valdur á ting fyri Javnaðarflokkin í Norðurstreymoy.